## DAGSINS MEINING

# Eru teir við at vakna?

Einaferð enn er líkt til, at okkurt fer at henda á íbúðamarknaðinum. Higartil hevur politikkurin hvørki verið miðvísur ella skapandi. Ikki síðani í 1978 er nakað munagott hent, tá lógin um Íbúðagrunnin varð samtykt.

Tey, sum eru tilvitandi á hesum øki, hava tí hug at vóna. Orsøkin er, at landsstýrismaðurin í trivnaðarmálum tykist skilja, at nú má okkurt henda á hesum øki. Øll, sum fylgja við á íbúða- ella sethúsamarknaðinum, ásanna, at í løtuni ræður lógloysi – anarki – í hesum samfelagsmáli.

Íbúðir og hús – serliga í høvuðsstaðnum – verða seld ella leigað fyri himmalhøgar prísir. Prísir, sum einki hava við byggikostnaðin at gera. Tað er ikki óvanligt, at smá kømur verða leigað fyri 3000 krónur um mánaðin. Og dømi er um, at byggimeistari, sum hevur keypt bíligt øki frá kommununi, selir 40-50 fermetra stórar íbúðir fyri einar 800.000 krónur. Tvíhús fara fyri 1,4 mió.kr. og meiri.

Hetta merkir, at ein vanlig familja við eini meðalinntøku ongan møguleika fyri at seta búgv. Tíansheldur hava einstaklingar – eitt nú einsamallar mammur við børnum – vón um at kunna seta fót undir egið borð. Harafturat eru tað onnur í samfelagnum, sum ikki hava møguleika at fáa lán, t.d. vegna vantandi arbeiðsføri.

Tað er tí í tøkum tíma, at nakað hendir, so vit kunnu skipa ein miðvísan íbúðapolitikk. Eftir tí, sum er komið fram, verða eigarar og leigarar ikki javnsettir. Men sambært Útvarpinum eru bæði politikkarar í samgongu og í andstøðu samdir um at skipa so fyri, at tað skal bera til hjá íbúðafeløgum, m.a. sjálvsognarstovnum, at byggja leiguíbúðir við somu møguleikum sum eigarar hava.

Ein sum byggir síni sethús, fær bæði rentustuðul og kann draga mvg´ið fyri handverkið frá. Tað fær eitt íbúðafelag ikki. Tí verður leigukostnaðurin so høgur, at rennur hann seg ikki í leigu-hámarkið hjá Leigunevndini, so er avmarkað, hvør hevur ráð at búgva í slíkari íbúð.

Bæði andstøða og samgonga kann skuldsetast fyri vantandi politkk á hesum øki, so tað áliggur báðum pørtum at fremja ein ítøkiligan íbúðapolitikk. Samstundis má leigulógin endurskoðast og fáast at virka fyri alt landið, so vit sleppa úr tí lógloyvi, sum í løtuni ræður.

Í løtuni er einki veruligt krav um leigusattmálar. Íbúðir ella kømur skulu iki góðkennast sum mannabústaður. Og tað er sum harraguðveit við, hvør gevur upp leiguinntøku. Tí kunnu vit staðfesta, at her er bæi talan um ein svartan marknað og ein meiri og minni mannminkandi støðu fyri eitt annars sosialt framkomið samfelag!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Luttøkutreytirnar til FM í svimjing enn óbroyttar

**Katrin Joensen**
*vegna Svimjisamband Føroya*



Vísandi til tað umtalu, ið hevur verið um luttøku til føroyameistarakappingina í svimjing av føroyiskum svimjarum, ið búgva uttanlands, skal Svimjisamband Føroya við hesum boða frá, at reglugerðin um at flyta millum feløg í norðanlondum ikki er sett í gildi í Føroyum.

Svimjifeløgini vóru eftir seinasta norðurlendska fundin við telduposti 15. mai 2002 kunnað um, at reglugerðin er sett í gildi í hinum norðanlondunum.

Av tí at reglugerðin er sett í gildi í Danmark, merkir hetta sostatt, at svimjarar, sum svimja til FM koma undir hesa reglugerð, tá teir fara aftur til Danmarkar at svimja.

Í sama telduposti varð boðað frá, at reglugerðin verður nú føroyiskað og verður løgd fyri fyrst komandi aðalfund.

Hetta merkir, at luttøkutreytirnar til FM í ár eru óbroyttar í mun til undanfarin ár.

# Illa fór Bussleiðin

**Jógvan Arge**
*býráðslimur fyri tjóðveldisflokkin*



Eftir viðgerðina, sum Bussleiðin í Havn fekk á býráðsfundinum hóskvøldið, kann av sonnum sigast, at hon fór illa, og taparin er borgarin í kommununi.

Býráðsmeirilutin samtykti at bjóða hesa kommunalu tænastu út við teirri høvuðsfortreyt, at hon skal kosta minni og koyra minni, enn hon ger í dag.

Í útbjóðingartilfarinum er so at siga onki innbygt um at menna Bussleiðina tey komandi sjey árini, sum ætlanin er, at teir nýggju sáttmálarnir við busseigarar skula fevna um.

Hetta sigur mær so mikið sum, at tað verður ein syndarlig tænasta, borgararnir í kommununi standa eftir við, tá tey sjey raku árini eru farin.

Vit í minnilutanum høvdu eitt nógv betri uppskot. Vit tóku atlit til bæði borgaran, ferðslutættleikan og umhvørvið.

Okkara uppskot var heilt einfalt, at økja um koyringina hjá Bussleiðini, so hon kann gerast eitt veruligt flutningstilboð fyri øll í kommununi.

Vit skutu upp, at útbjóðingartilfarið varð gjørt av nýggjum og hædd tikin fyri títtari koyring enn higartil í meldurtíðini. Somuleiðis skutu vit upp, at koyringin leygardag og sunnudag varð varðveitt og møguliga útbygd.

Uppskotið vann tíanverri ikki frama, men meirilutin kom við eini forkølaðari eykaorðing um at tey, sum bjóða upp á Bussleiðina, eisini skula geva upp ein tímaprís fyri koyring sunnudag.

Um hetta merkti, at kundarnir hjá Bussleiðini ikki eru sleptir heilt upp á fjall sunnudag, fekst ikki at vita á býráðsfundinum, har nógv varð gjørt burtur úr, at nýggja uppleggið fyri Bussleiðina kostar kommununi 2,4 mió minni enn hon kostaði í fjør.

Ein av okkara próvgrundum var, at tað er ikki bara rætt av kommununi at meta Bussleiðina á sama hátt sum eitt vinnuvirki, tí hetta er ein kommunal tænasta, sum er við til at gera kommununa verda at búgva og virka í og lønar seg aftur mangar aðrar vegir.

Við góðari kommunalari bussleið slepst eitt nú undan nógvari aðrari ferðslu á vegunum, tørvurin á parkeringsplásssum verður ikki so stórur og eisini slepst undan nógvum skaðiligum útláti frá bilferðslu.

Fólk, sum hava skil fyri rutukoyring av hesum slagnum, eru sannførd um, at koyrdu bussarnir í Havn títtari, so brúktu nógv fleiri fólk teir.

Sum nú er koyra teir ov sjáldan og fólk kann ikki í nóg stóran mun dúva upp á teir.

Sum út sær, er ætlanin at tað bara skal verða verri í framtíðini.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Dømi um av leiðingarnar, tá persónur uttan evni og neyðugan moral fær vald

**Anna Berjastein**
*Fuglafjørður, hin 15. juni 2002*

Eg havi við undran fylgt við í tíðindaflutninginum í sambandi við samráðingarnar millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Fíggjarmálastýrið um nýggjan sáttmála fyri skipini hjá Strandfaraskipum Landsins.

Serliga havi eg bitið merki í arbeiðsháttin hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni, har hann alla tíðina hevur roynt at staðið fram sum tann rættvísi, samstundis sum hann við lygisøgum hevur svertað samráðingarmótpart sín til.

Veruleikin er tó tann, at hesin maður hevur alla ábyrgdina av, at samráðingarnar drógu út og eingin semja fekst fyrr enn fyri nøkrum vikum síðani.

**Tjóðveldisflokkurin og fakfelagsrørslan**

Karsten Hansen, landsstýrismaður, hevur sum umboð fyri Tjóðveldisflokkin víst ein so vanvirðisligan hugburð mótvegis føroysku fakfelagsrørsluni, at tey flestu fakfelagsfólk hava verið á einum máli um, at Fíggjarmálastýrið undir leiðslu hansara ongantíð áður hevur víst so lítlan vilja at taka upp veruligar samráðingar við føroysku fakfeløgini.

Tjóðveldisflokkurin, sum Karsten Hansen umboðar, hevur nærum uttan undantak stuðlað hesum fakfelagsfíggindaliga politikki, og føroyingar eiga at leggja sær í geyma, at flokkurin, sum einaferð segði seg vera flokkin hjá verkamannafjøldini, í dag helst er størsti fíggindi hjá vanliga føroyska løntakaranum.

Ikki tí at hetta kann koma óvart á føroyingar, tí flokkurin hevur farnu 4 árini víst at hann bert hugsar um loysingina, og als ikki hevur áhuga fyri vanliga føroyinginum og hetta ger, at ein maður sum Karsten Hansen fær loyvi at føra sítt stríð móti vanliga føroyska løntakaranum.

**Moralurin hjá Karsten Hansen**

Tá ein persónur, sum ongantíð hevur skarað framúr intellektuelt harumframt tørvar neyðugan moral, so kann hetta ikki annað enn vísa seg aftur sum ótespuligar avleiðingar, tá hesin persónur fær litið upp í hendi at stýra einum týðandi parti av føroysku umsitingini.

Tá samráðingarnar vóru av og nýggjur sáttmáli var undirskrivaður um skipini hjá Strandfaraskipum Landsins, so væntaðu flest øll, at nú var friður, men soleiðis vildi Karsten Hansen ikki hava tað. Hann fer 17. mai í Fregnir og svertar samráðingarnevndina hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag til, og ikki nokk við, at hann í sera niðurgerandi orðingum viðgerð farnu samráðingarnar, men hann dregur eisini heilt óviðkomandi viðurskifti upp í útspillingarherferð sína.

Hetta vísir malska støðið hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni.

Eg kann í hesum sambandi vísa til sera avdúkandi greinina, sum nevndin í Føroya Arbeiðarafelag herfyri hevði í bløðunum, har nevndin vísir á tann ágang, sum hesin politikari hevur fram móti fakfeløgunum, men tíverri hava hini fakfeløgini alt ov leingi tagt og harvið fær Karsten Hansen loyvi til at halda fram við sínum óndsinnaðu álopum á føroysku fakfeløgini.

**Brimil, Teistin og fútarætturin**

Hóast Karsten Hansen í fjølmiðlunum hevur róst sær av, at fá verkfall hava verið í hansara tíð sum fíggjarmálaráðharri, so vísir veruleikin eina heilt aðra mynd av avleiðingunum at hava henda mann sitandi sum fíggjarmálaráðharra.

Hvør hevði ábyrgdina av, at Brimilsmálið varð lagt fyri Løgtingið?

Hvør hevði ábyrgdina av, at málið um Teistin nærum var endað í Løgtinginum?

Hvør hevði ábyrgdina av, at almenni arbeiðsgevaraparturin fór at brúka danska fútarættin sum vápn móti føroyskum fakfeløgum?

Jú, tað var Karsten Hansen, sum hevði ábyrgdina av hesum ódámligu stigum mótvegis fakfeløgunum, og hetta eru bert dømi um beinleiðis ágang hansara.

**Prísturin fyri at verja rættindi hjá limum sínum**

Hóast nær í ætt við formannin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, so hevur hann ongantíð grett orð við meg um samráðingar sínar við Fíggjarmálastýrið og enn minni hevur hann nakrantíð grett orð um tann prís, sum eg veit at hann hevur goldið fyri at verja rættindini hjá limunum í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Sum tann yvirmaður sum hevði hægsta starvsaldur á Vaktar & Bjargingartænastuni var tað sjálvsagt, at formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag átti at havt fingið tilboð um at gerast skipari umborð á nýggja vaktar- og bjargingarskipinum Brimil.

Mær er eisini sagt, at ætlanin var at hann skuldi gerast skipari á Brimli.

Tað var tó áðrenn samráðingarnar um lønarásetingarnar fyri Brimil veruliga vóru byrjaðar.

Brimilsmálið endaði jú í Løgtinginum, og tað skal ikki nógv hugflog til fyri at duga at síggja samanhangin millum Brimilsmálið, har formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag manniliga vardi áhugamálini hjá limum sínum, og so ta sannroynd, at hesin sami yvirmaður, við longsta starvsaldri á stovninum, ikki slapp umborð á Brimil.

Vit kunnu bert hugsa okkum tann leiklut, sum Karsten Hansen hevur í hesum máli, men neyvan er nógv at ivast í, at tætt samband er og hevur verið millum umsitingina í Fíggjarmálastýrinum og umsitingina í Fiskimálastýrinum, eisini tá Brimilsmálið varð viðgjørt av myndugleikunum.

Eg eri tó sannførd um, at formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag ikki letur seg nerva av slíkum ágangi á hansara persón, men henda ódámliga søga sigur ikki so lítið um rættartrygdina hjá vanliga føroyinginum, tá tað eru Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, sum ráða fyri borgum.

**Fakfeløgini mugu standa saman móti verandi fíggjarmálaráðharra**

Næstu ferð kann tað verða tú ella eg, sum verða rakt av ódámliga umsitingarháttinum hjá verandi samgongu, og tí vil eg inniliga heita á øll føroysk fakfeløg um alment at tala at hesari mannagongd, sum Karsten Hansen er størsti forsprákarin fyri.

Bert við at avdúka og tala at áganginum móti føroysku fakfeløgunum og við at standa saman kunnu vit steðga hesum ódámliga ráki í samfelag okkara, her munur verður gjørdur á teimum, sum bert tosa Fíggjarmálastýrinum eftir munninum, og teimum, sum sakliga arbeiða fyri sjónarmiðum sínum.

# Konsert heima á Sandi mikukvøldið 19. juni

**Palli Dalsgaard**



Í sambandi við at heimasandsmaðurin Sunleif Rasmussen hevur fingið Norðurlanda virðisløn fyri sín tónleik, var konsert í Ungmannafelagshúsinum á Sandi í kvøld. Eg var á hesi konsertini, hóast eg ikki kann rósa mær av at hava nakað skil fyri tílíkum tónleiki, so var tað eitt áhugavert kvøld. Nú hevur so nógv verið tosað og skrivað um tónleikin hjá Sunleifi, og sjálvur var hann í sjónvarpinum fyri ikki so langari tíð síðan, so tann sum hevur gjørt sær ómak av at lesa um hansara tónleik og at lurta eftir tí, sum tosað er við og um hann, hann hevur fingið eitt sindur av skili fyri tí, ið framført verður av hansara tónleiki.

Tað var væl av fólki møtti upp hetta kvøldið, og tað var væl fyrireikað. Fyrst segði landsstýrismaðurin Páll á Reynatúgvu nøkur orð sum innleiðing, har hann greiddi frá, at Sands bygdarráð saman við Summartónum hevði fingið hetta tiltakið í lag fyri at heiðra bygdarmannin. Eftir at Páll hevði tosað helt Eli Hentze lærari eina røðu fyri Sunleifi. Teir báðir handaðu Sunleifi eina gávu, ein málning av Frimod Joensen, og blómutyssi frá bygdarráðnum.

Tá tað var gjørt framførdu tvey fólk, maður og kvinna, tvey tónleikastykkir, sum annað var av Sunleifi. Tá tey vóru at enda komin var steðgur, og í steðginum fingu vit kaffi og køkur. Eftir steggðin spældu tey aftur tvey stykkir. Sigast kann, at hetta var eitt gott hugnakvøldið, vit fóru øll væl hýrd aftur at húsum og tey flestu av okkum mundu hava fingið nakað fyri pengin.

Eg kom eina náttina til gongu heim ígjøgnum Sandslíð, tað var heilt nógvur vindur, landsynningstømingur. Fyrst eg kom í líðina dreip uppi, tað vil siga, har lívdi var stilli. Men at hoyra dunið í hamrinum, við øllum teim skiftandi ljóðum av vindinum, sum fór gjøgnum gjótur og hvønn hamarsspjalla, og í grótinum um hamarsrøðina. Har vóru nógv ymisk ljóð at hoyra, og ikki at tala um brimdunið undir í neðra, tað hevði eisini sínar ymisku tónar. Tá hugsaði eg ikki um tónleik av hesum huldukendu ljóðum, men síðan Sunleif er komin fram við sínum tónleiki, havi eg mangan hugsað um tað eg hoyrdi hesa náttina heim í Sandslíð. Gamalt er sagt: Ein lærir so leingi hann livir.

# Skúlabarnaflutningur við SL

**Heðin Zachariasen**
*tingmaður*



Hugdi at degi og viku fríggjakvøldið 14.06.2002, eg bleiv ikki sørt bilsin at síggja og hoyra lærara greiða frá, at hann og hansara skúlaflokkur ikki kundu verða flutt frá Tórshavn og til tað pláss, sum tey høvdu ætlanir um at fara at ferðast.

Grundin til hetta var, at SL ikki hevði nokk av bussum at flyta hesi umleið 40 fólkini við. Grundgevingin var, at ruturnar vóru privatiseraðar og SL ikki fór at leggja pening til fyri hesi fólk. Nú kundi ein kanska spurt, hvat skuldu hesi fólka gjalda fyri ferðina og hvussu nógv noyddist so SL at gjalda fyri at flyta hesi fólk? Nei, Poul Jákup Thomsen, hetta eigur tú, sum settur fólkaflutningsleiðari hjá SL, at taka fulla ábyrgd av, og hetta er eisini uttanfyri alt mark ein flutningsfyritøka sum SL kann bjóða fólki, ella havi eg misskilt okkurt, er tað ikki flutningur av ferðafólki tú arbeiðir við hjá SL?

At umbera seg við at ruturnar eru privatiseraðar, átti ikki at komið frá Poul Jákup Thomsen, sum sjálvur hevur havt alla útbjóðing hjá SL um hendi, og góðtikið og undirskrivað allar sáttmálarnar við teir, sum nú røkja hesar rutur. Í hesum føri er tað ikki teir sum koyra, men teir sum leiða arbeiði hjá SL, sum eiga at taka fulla ábyrgd av hesum óskili.

Eisini kann eg leggja afturat her, at í útbjóðingartilfarinum, sum Poul Jákup Thomsen greiddi frá á Hotel Hafnia 11. september 2001, stendur: Útbjóðingartilfar felagstreytir: síðu 5.

Viðmerkjast skal, at útbjóðingin umfatar skúlabarnaflutning, koyring av ítróttarfólki o.a. í tann mun hetta er innan vanligu ferðaætlanina. Í sama útbjóðingartilfari er gjørt yvirlit yvir ferðafólk, sum hava ferðast á øllum leiðum hjá SL ár 2000, at koma í Dag og Viku, og fáa fólk at halda, at grundin til hetta óskil er at ruturnar eru privatiseraðar, er heilt burtur við.